

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 08 - 2013

# Oljuprísur upp við rúkandi ferð

Tíðliga í morgun náddi oljuprísurin 117 dollarum fyri tunnuna. Hetta hendir eftir hóttanir frá Vestanlondum um at leggja upp í borgarakríggið í Sýrialandi. USA sigur seg nú hava prógv fyri, at tað var Assad stýrið, sum stóð aftanfyri brúk av kemiskum vápnum herfyri, sum drap meira enn 1000 fólk. Tann 1. juni í ár var oljuprísurin 100 dollarar fyri tunnuna. Í gjár var hann 111 dollarar, so hann er farin upp við rúkandi ferð eftir einum degi. Umframt stríðið í Sýrialandi hevur støðan í Egyptalandi eisini ávirkan á oljuprísin. Somuleiðis ávirkar sera avmarkaða framleiðslan í Libya eisini oljuprísin. Hon er uppá 200.000 tunnur um dagin ella umleið eina mió. lægri enn, tá hon var í hæddini. Bensinprísirnir í okkara grannalondum eru nógv hækkaðir um somu tíð. Í Norra hevur prísurin á bensini ongantíð áður verið so høgur. Orsøkin er oljuprísihækkingin og ein veik norsk króna í mun til dollaran. Blýfrítt bensin í Norra kostar í dag 15,71 kr. og diesel 14,40 kr. liturin.